# Jólabýur í Tinghúsgarðinum

Í Tinghúsgarðinum í miðbýnum í Havn – t. e. økið millum tinghúsið/gomlu telefonstøðina og Gongugøtuna - hevur Tórshavnar kommuna gjørt ein lítlan, fittan, hugnaligan jólabý, har skipað verður fyri jólasølu og jólahugna í jólamánaðinum.

Talan er um somu húsini, ið vóru karmur um jólakalendaran í fjør hjá Sjónvarpinum. Tá stóðu smátturnar úti á Reyni, men eru tær nú fluttar í Tinghúsgarðin.

Sum vit nærkast hugnaliga lítla býnum, merkja vit jólaliga angan av holukøkum, vaflum og brendum mandlum, meðan jólatónleikur hoyrist millum húsini.

Tónleikabólkar, felagsskapir í býnum og skúlaflokkar fara at hava tiltøk og sølu í smáttunum, soleiðis at jólamánaðin í miðbýnum verður so hugnaligur sum gjørligt.



























